

## Koyrikortið kann vekslast í Onglandi

Vinnumálaráðið hevur í samstarvi við Akstovuna fyrireikað føroyska umsókn til bretsku koyrikortmyndugleikarnar, DVLA, og hesir hava nú boðað frá, at umsóknin er gingin á møti, og at neyðugu skjølini eru undirskrivað av ráðharranum. Hetta merkir, at føroyingar í Stóra Bretlandi uttan víðari kunnu umbýta eitt føroyskt koyrikort til vanligan persónbil (bólk B) til eitt samsvarandi bretskt koyrikort. Hetta verður væntandi ein stórur lætti hjá føroyingum, sum velja at búseta seg í Stóra Bretlandi í styttri ella longri tíð. Vinnumálaráðið ætlar saman við Akstovuni at nýta bretsku góðkenningina til eisini at fáa umbýtisrætt í øðrum londum, har hesin møguleiki ikki er til staðar í dag. Viðgerðin í Stóra Bretlandi hevur víst seg at vera drúgv, og tí ber ikki til at siga, nær komið verður á mál í øðrum londum, har føroyingar búsetast og starvast.

## Stórur áhugi fyri búseting í Ánunum

Av teimum 15 húsunum, sum verða bygd í Ánunum við Klaksvík, er meginparturin longu seldur. Tað er SP/F JFT Connector stendur fyri byggiætlanini, og á kunningarkvøldi í El-In í Klingrugarði í kvøld fara umboð fyri byggifyritøkuna at greiða frá henni. Umboð fyri Eik fara eisini at greiða frá fíggingarmøguleikum, og húsameklarafelagið Inni, sum stendur fyri søluni av húsunum, verður eisini við. Arbeiðið í Ánunum er longu farið í gongd, og síðstu húsini verða liðug í august í ár.

# Familjulega í Nesvík

**Áhugatímar til foreldrini og tiltøk til børn og ung verða á afturvendandi familjulegunum í Nesvík**

NESVÍK
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



Vikusiftini 16.-18. februar og 23.-25. februar skipar familjunevndin hjá Heimamissiónini fyri familjulegu í Nesvík.

Familjulega verður hildin tvær til tríggjar ferðir um árið. Vanliga eru tvær legur í februar mánað og ein fyrst í august mánað. - Legurnar verða vanliga væl vitjaðar og eru sera væl dámdar, siga fyrireikararnir.

**Familjuhugni**

– Á familjuleguna koma fólk úr øllum landinum. Tí er legan eisini eitt gott høvi hjá til dømis bindiklubbum, starvsfelagum, ella hjá vinfólki, sum búgva langt frá hvørjum øðrum, at hittast og vera saman í nakrar dagar, siga fyrireikararnir.

**Áhugatímar**

Hesaferð verða tveir áhugatímar á skránni á hvørjari legu. Fríggjakvøld koma umboð úr Bláakrossi at tosa um ein góðan uppvøkstur – um tað at seta mørk hjá børnum og ungum. Umboðini frá Bláakrossi hava saman við øðrum luttikið á fleiri vælumtóktum foreldrafundum hjá barnagørðum og skúlum í vetur. Leygarmorgun kemur Bergur Debes Joensen at hava áhugatíma um ymiskleikan millum kynini við heitinum »so ymisk og tó«. Barnaansing er til áhugatíman leygarmorgun. Aftaná áhugatímarnir verður møguleiki til kjak og spurningar.

**Tiltøk til børn og ung**

Í fleiri ár hava familjulegurnar havt væleydnaðar hugnaløtur fyri ung um kvøldi. Hesar eru nú útbygdar soleiðis, at samstundis, sum tey ungu hittast, so hittast tey 8-12 ára gomlu eisini til sína egnu hugnaløtu. - Til hesar hugnaløtur koma fólk uttanífrá leguni at hava hugnaløtu, og eisini fáa tey okkurt gott frá kokkunum, siga fyrireikararnir.

**Príssamhaldsfesti eyðkennir familjulegurnar**

Familjulegan er serstøk á tann hátt at tað kostar eins fyri allar familjur, sama um ein hevur eitt barn ella fimm børn. Kostnaðurin er eisini tann sami um bert mamman ella bert pápin fer á familjulegu saman við børnunum. Hetta er avgjørt ein fyrimunur fyri barnríkar familjur, sum kanska ofta verða noyddar at setast aftur tí kostnaðurin blívur ov høgur. Endamálið við hesum er eisini at øll familjan skal koma á legu, eisini páparnir.

Fyrireikari av familjuleguni er familjunevndin hjá Heimamissiónini.

# Nátt á Myspace

Melodiski og varierandi tungmálms bólkurin Nátt úr norður- og eysturoyggjum, hevur nú fingið síðu á portalinum myspace.com. Bólkurin Nátt bleiv stovnaður í Januar 2006, og er so at siga enn í byrjunarstøði. Limirnir eru í løtuni upptiknir við skúlagongd, men hóast hetta hittast teir javnan at skriva løg og venja saman. Bólkurin luttók í GBOB kappingini í fjør, har teir fingu góða móttøku, tó uttan at at sleppa finaluna.




Á Myspace síðuni hjá bólkinum, ber til at hoyra trý nýggj løg, sum sambært limunum vísa á eina framgongd í sangskrivingini hjá bólkinum. Teir lýsa tónleikin sum eina samanrenning av Metal og Thrash við melodiskum vendingum.

Vitja bólkin á http://www.myspace.com/nattband

**fs**

Veitst tú eina góða?
Ring til Sosialin
tlf 341800

